## TIT SPYRJA VIT SVARA


Bergur Hanusson, djóralækni


Heri Joensen, prestur


Heri Kragesteen, sálarfrøðingur


Ingi Højgaard, løgfrøðingur


Jens Andreassen, lækni


Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur


Jón Klein Olsen, politistur


Jón Kragesteen. Ferðslutrygd


Julianna Næs, pedagogur


Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi


Turid Thomsen, lestrarvegleiðari


Marius Staksberg, málfrøðingur

SOSIALRÁÐGEVIN

### Kann eg fáa framskundaða fólkapensjón

Eg eri ein kona, sum verði 62 ár nú til várs. Eg vil spyrja, um eg kann fáa framskundaða fólkapensjón, tá eg eri fylt 62. Eg eri heimagangandi og havi verið tað í nógv ár. Eg havi ikki heilsu at fara á flakavirki at arbeiða. Maður mín hevur fast arbeiði. Og hvar søkir ein um fólkapensjón?

*Møguleiki er fyri at søkja um fyritíðarpensjón hjá persónum millum 50 og 67 ár og fáast umsóknarbløð við at venda sær til Almannastovuna á telef. 3154 80.*

*§ 8 punkt 2 í lóg um almannapensjónir sigur: At persónum millum 50 og 67 ár og persónum, ið hava hava móttikið pensjón eftir § 7, stk.1 nr 3, men hava mist rættin til hesa, tí yngsta barnið hevur fylt 18 ár, tá viknandi heilsa, vantandi arbeiðsmøguleikar ella aðrar serligar umstøður gera, at viðkomandi hevur brúk fyri hjálp til uppihald.*

DJÓRALÆKNIN

### Hundurin ræðist seyð

Vit hava fingið okkum ein lítlan hvølp, sum vit ætla skal verða seyðahundur. Hann er nú næstan fýra mánaðir, men ólukkudýrið ræðist seyð. Eg haldi, at hann eina ferð bleiv stútaður av einum seyði, tá ið hann varð heilt lítil hvølpur. Summi siga nú, at hann verður aldrin seyðahundur, tí hann einaferð er blivin stútaður. Er tað rætt og skulu vit gloyma alt um at fáa hann til seyðahund? Ella fer hann at broytast, so hvørt hann veksur? Veit djóralæknin um nakrar leiðbeiningar eru um, hvussu ein best venur ein seyðahund?

*Nógv verður gjørt burtur úr at venja hundar til at greiða serligar uppgávur. Til dømis verða hundar vandir at hjálpa blindum, at leita upp fólk, til vaktarhundar, seyðahundar og nógv annað. Venjingin verður vanliga býtt upp í stig. Fyrsta stigið er ein støðisvenjing, har hvølpurin verður vandur at verða lýðin. Tann serliga venjingin til t.d. seyðahund eigur ikki at byrja av álvara, fyrr enn hundurin er 8-10 mánaðir gamal. Umráðandi er, at uppgávan verður tikin í álvara bæði av hundaeigara og av hundi, og at venjarin er avgjørdur í øllum lutum. Skeið verða hildin í venjing av hundum, serliga aðra staðni, men eisini her í Føroyum. Best hevði ivaleyst verið at sett seg í samband við fólk, sum hava royndir við seyðahundum, men annars er nógv skrivligt tilfar til um venjing av hundum.*

*Tað er hugsandi, at hvølpur tykkara hevur fingið ein hvøkk fyri lívið, tá hann bleiv stútaður, og at hetta kann fara at hava við sær, at tað verður torført at venja hann við seyð. Tit skulu ikki rokna við, at hetta fer av honum av sær sjálvum, so hvørt hann veksur, men hin vegin er hann so ungur enn, at ein miðvís og varislig venjing við seyði kanska hevði gjørt, at hann fekk dirvið aftur.*

LØGFRØÐINGURIN

### Gøtu kirkja

Vit hava eina gamla kirkju í Gøtu, sum eitur Gøtu kirkja. Nú hava við fingið eina nýggja kirkju, sum eisini eitur Gøtu kirkja. Báðar kirkjurnar verða brúktar. Tann gamla kann verða brúkt eftir ynski. Øll eru góð við gomlu kirkju, og er tað veruliga sárt at navnið verður tikið frá kirkjuni. Er hetta løgfrøðiliga rætt? Eingin veit, hvussu tann gamla kirkjan eitur. Onkuntíð verður lýst í Gomlu kirkju. Hetta er púra burturvið. Annars so stendur hon á fallandi fót, tí eingin veit, hvør eigur hana.

*Gamla kirkjan hevði navnið Gøtu kirkja, tí hon liggur í Gøtu. Nýggja kirkjan hevur navnið Gøtu kirkja, tí hon liggur í Gøtu. Eg gangi út frá, at navnið er givið nýggju kirkjuni av teimun røttu myndugleikunum. Eg vil ikki meta, at gamla kirkjan í Gøtu hevur serlig rættindi til staðarnavnið Gøtu. Vísandi hertil vil eg meta, at løgfrøðiliga er rætt farið fram.*

MÁLFRØÐINGURIN

### 40 fót ella 40 fóts

Umborð er tvístøða komin í um tað eitur *ein 40 fót containari* ella ein 40 fóts containari, tí á enskum verður sagt *one 40 foot* og *two 40 feet*. Onkur av okkum sigur, at tað snýr seg um ein containara, meðan onkur annar sigur tað eru fleiri føtur, sum vit tosa um, og tí skal tað verða fóts og ikki fót.

*Eftir reglunum eigur tað at vera ein* 40 fóta containari. 40 *knýtir seg fyrst og fremst at* fóta*, og ger av, hvørjum tali tað stendur í. Av tí at* 40 *er fleirtal, verður* fóta *tí eisini fleirtal.* ein *ger av, hvørjum tali* containari *stendur í; av tí at* ein *er eintal, er* containari *eisini eintal. Vóru containararnir tveir, søgdu vit* tveir 40 fóta containar<u>ar</u>. *Lagt skal vera afturat, at* fóta *er hvørsfall fleirtal av* fótur*; hvørsfall eintal er* fóts. *Í grundini er eitt orð slept her, kanska* langur *ella* breiður. *Var tað tikið við, høvdu vit ein* 40 fóta langur/breiður containari. *Vit kunnu bera saman við* ein 40 ára gamal maður *og* tveir 40 ára gamlir menn; ára *broytist ikki, um talan er um ein mann ella fleiri menn.*

*Reglurnar eru tær somu í enskum sum í føroyskum á hesum øki. Tað skuldi sostatt verið* one 40 feet container *og* two 40 feet containers, *har* feet *er óbroytt, antin vit hava ein ella tveir containarar. Tá ið vit kortini hava* one 40 foot *og* two 40 feet, *er tað tí, at* container *eisini er slept her, nakað sum tá ið vit siga* ein øl *í staðin fyri e*in fløska av øli *ella* ein ølfløska. *Og* foot *verður so bent, sum um tað var containarin, á líknandi hátt sum vit kunnu siga* ølirnar *í staðin fyri* ølfløskurnar.

*At enda skal verða nevnt, at vit sum kunnugt hava orðið* bingja *fyri* container. *Tað hevði so verið* ein 40 fóta bingja *og tvær* 40 fóta bingjur.

**Spyrjið serfrøðingarnar**

Hava tit spurningar til serfrøðingarnar, kunnu tit senda teir til:

**Sosialin**
postsmogu 76
110 Tórshavn

ella á fax: 314720
og teldupostadressuna:
spyr@sosialurin.fo

# Nýggja tólið verður stór hjálp

**Klaksvíkar sløkkilið hevur fingið nýtt tól, sum kann gerast stór hjálp í arbeiðnum hjá sløkkiliðnum. Norðoya Sparikassi hevur latið tólið, sum er tað fyrsta av sínum slagi í landinum**

ÚTGERÐ
*Eyðun Klakstein*


*Norðoya Sparikassi hevur goldið fyri nýggja Fire Flir tólið hjá sløkkiliðnum í Klaksvík, og tólið varð handað sløkkiliðnum á ábyrgdarafundinum fríggjakvøldið*

Á ábyrgdarafundinum hjá Norðoya Sparikassa fríggjakvøldið fekk sløkkiliðið í Klaksvík stóra gávu frá sparikassanum

Talan er um fyrsta Fire Flir tólið, sum er komið landið. Hetta er tól, sum til dømis ger tað lættari at leita eftir fólki í húsum, har nógvur roykur er. Tólið skrásetir allar smámunir í hitanum, og tað ger, at til dømis fólk kunnu síggjast í tólinum, hóast bølamyrkt er inni.

Tólið kann eisini brúkast til at leitað eftir eldi millum skins og hold, tí í tólinum sæst, hvar mesti hitin í vegginum er. Hetta kann í ávísum førum lætta nógv um sløkkiarbeiðið, tí tað kann sleppast undan at oyðileggja eina heilan vegg fyri at leita eftir eldsbrunanum.

- Vit eru sera fegnir um, at sparikassin hevur latið okkum hetta tólið. Tað kann gerast ein stór hjálp í okkara arbeiði, sigur Kári Kjelnes, sløkkiliðsleiðari í Klaksvík.

### Fyrsta av sínum slagi

Fire Flir tólið er gjørt við hernaðarligari útgerð, og at tólið riggar var sjón fyri søgn, tá venjing var umborð á Smyrli um vikuskiftið. Menn frá sløkkiliðnum í Klaksvík vóru við í venjingini við nýggja tólinum, og tað gekk væl hjá teimum at finna fólkini, sum vóru umborð.

Í farnu viku víst sløkkiliðið í Havn hetta tólið fram. Sløkkiliðið í høvuðsstaðnum hevur eisini biðið um eitt slíkt tól, men teir hava ikki fingið sítt enn. Teir vístu tí tólið hjá klaksvíkingum fram.

- Vit søktu ymsar grunnar og feløg fyri at fáa stuðul til tólið, men tað var bara Norðoya Sparikassi, sum vildi lata pengar, og teir avgjørdu enntá at gjalda alt tólið, sum tað var. Tað eru vit sera fegnir um, sigur Kári Kjelnes, sløkkiliðsleiðari.

Fire Flir tólið kostar 160.000 krónur, og hendan upphæddin varð latin sløkkiliðnum í Klaksvík á ábyrgdarafundinum fríggjakvøldið, har næstan 800 fólk vóru við.



# Bóndafelagið havt aðalfund

TÍÐINDASKRIV
*Bóndafelag Føroya*

Bóndafelagið hevur nú havt sín 44. ársaðalfund. Hetta er fyrsta árið felagið virkar eftir nýggjari skipan.

Arbeitt hevur verið miðvíst við at betra um fíggjarligu karmarnar hjá felagnum, og á eykaaðalfundi í fjør var samtykt at broyta limagjaldsásetingina og býta limaskaran í tvinnar partar. Nú eru virkandi limir sum eru aktivir bóndur (sum hava landbúnað sum høvuðsvinnu) og áhugalimir, sum kunnu verða tilstundandi –og haldbóndur eins og hjúnafelagar og onnur sum hava serligan áhuga í landbúnaðinum, eisini kunnu felagskapir innan landbúnaðin verða áhugalimir. Tað hevur gingið væl við limatekningini eftir nýggju skipanini og tað koma støðugt nýggir limir til.

Í nevndini sita nú: Bjørn Patursson, Anna Rubeksen, Tummas Eikhólm, Louis Houmann, Óla Jákup í Dímun og Andras Joensen. Tórfinnur Dalsgarð og Regin Borðoy eru eykalimir. Nevndin hevur skipa seg við Bjørn Patursson sum formanni og Annu Rubeksen sum næstformanni. Óla Krisjan Debess bóndi á Oyrareingjum stóð fyri vali á hesum aðalfundinum, men hann bar seg undan afturvali, tí hann nú metir seg hava sitið í nevndini fyri seg. Óla Krisjan var í mong ár formaður felagsins meðan hann hesi seinastu árini hevur verið nevndarlimur. Óla Krisjan hevur verið trúgvur felagsmaður innan alt felagsarbeiðið landbúnaðinum til frama.

### Endamál Bóndafelagsins er:

a) At menna samkenslu og samhald millum bóndur.
b) At fremja kunnleika, dugnaskap og siðmenning hjá limum og øll góð eyðkenni, sum fedrarnir hava givið okkum til arvar, og sum merkja okkum sum rættar føroyingar og álitismenn.
c) At verja rættindi, lunnindi og jarðir bónda.
d) At stimbra vinnuveg limanna soleiðis, at samstundis sum framleiðsla teirra verður sum mest og best má úrtøka teirra í peningi verða hareftir.


*Bjørn Patursson er formaður í Bóndafelagnum*

# Aðalorðaskifti um uttanlandsmál

**Einki er at ivast í, at einar sjálvstøðugar Føroyar verða noyddar at taka trygdarpolitiskar avgerðir, ið gagna landinum best bæði við atliti at egnari trygd og trygdini hjá grannalondunum í Norðurhøvum, sigur Anfinn Kallsberg m.a. í formælinum til frágreiðingina**

AÐALORÐASKIFTI
*Ólavur í Beiti*

Sambært skránni hjá løgtinginum fer Anfinn Kallsberg, løgmaður, helst hósdagin á fimta sinni at leggja fram frágreiðing um uttanlandsmál fyri Løgtingið.

Løgmaður sigur, at frágreiðingin hevur, sum áður fráboðað, til endamáls at kunna Løgtingið um gongdina í uttanlandsmálum. Og løgmaður vónar, at orðaskiftið um frágreiðingina fer at geva eina ábending um tær uttanlandspolitisku avgerðir, sum landsstýrið ætlar at taka saman við Løgtinginum í næstum.

Í frágreiðingini hjá løgmanni hava trygdarmál fingið serstaka umrøðu í mun til undanfarnar frágreiðingar. Lagt verður upp til, at hernaðarkanningin vestanfyri verður gjølla viðgjørd á tingi. Eisini verður nomið við trygdarpolitikk Føroya í framtíðini.

### Taka avgerðir

– Einki er at ivast í, at einar sjálvstøðugar Føroyar verða noyddar at taka trygdarpolitiskar avgerðir, ið gagna landinum best bæði við atliti at egnari trygd og trygdini hjá grannalondunum í Norðurhøvum. Við øðrum orðum, neyðugt verður at hava okkara felags norðuratlantisku trygd í huga, tá ið trygdarpolitiskar avgerðir verða tiknar, sigur løgmaður í formælinum.

– Sjálvstýri til Føroya fólk eru uttan iva størsta mál, ið er viðgjørt á Løgtingi í nýggjari tíð. Gongdin í málinum gevur greiðar ábendingar um, at heimastýrislógin einans kann skiljast sum ein fyribilsskipan á veg móti fullum sjálvstýri. Havast skal í huga, at meirilutin á Løgtingi, ið samtykti heimastýrislógina í 1948, tekur ikki undir við henni longur, staðfestir Anfinn Kallsberg.

Og løgmaður endar formælið við at siga, at nú frágreiðingin um uttanlandsmál verður løgd fram, er tað við teirri vón, at hon verður grundarlag undir einum uppbyggjandi orðaskifti á Løgtingi.

# Munn og kleyvsótt og fremmand seyðaklipparavitjan

TÍÐINDAKSRIV
*Bjørn Harlou*
*Landsdjóralækni*

Landsdyrlægen er blevet opmærksom på en annonce i Okkara Gulu (Leyardagur 24.03.2001), hvori der tilbydes fåreklipning af en fåreklipper, som vil besøge Færøerne i weekenden 30 marts.

I den forbindelse skal opmærksomheden henledes på § 5 stk. 3 i K. nr. 23 frá 15.03.2001 um tiltøk til fyribyrging av munn- og kleyvasótt, hvori det fastsættes:

’Fólk, sum hava vitjað húsdýrabrúk í Stórabretlandi og øðrum londum ella umráðum, har munn- og kleyvasótt hevur tikið seg upp, skulu, tá tey koma til Føroya, seta seg í samband við Landsdjóralæknan beinan vegin (tlf. +298 322600 eller +298 211311) so gjørt kann verða av, um tað í teim einstøku førunum er neyðugt við serligum tiltøkum’.

Med hjemmel i § 6 i samme kunngerð nedlægger Landsdyrlægen samtidigt følgende forbud:

Fåreklipning på Færøerne må ikke foretages af personer, som har klippet får i udlandet, med mindre vedkommende har fået skriftlig tilladelse fra Landsdyrlægen.

Baggrunden for ovennævnte forbud er, at mund- og klovesyge udbruddet i Storbritannien, som også har ramt Frankrig, Irland og Holland.

De engelske veterinærmyndigheder har gjort sig følgende erfaringer, i forbindelse med udbruddet:

- Smitten har overvejende ramt slagtefår.
- Inkubationstiden (dvs. tiden fra dyrene blev smittet til sygdommen bryder ud) er helt op til 14 dage.
- Symptomerne er ikke så markante hos får som hos kvæg. Det mest almindelige symptom er halthed.
- Smitten er fortrinsvis spredt ved flytning af får.

Kun få udbrud kan relateres til luftbåren smitte, idet smitten er koncentreret til 3 områder, hvor der ses mange udbrud. De øvrige områder har kun få udbrud.

# Matiné í Havnar kirkju

**Leygardagin 31 mars kl.11.30. Hesaferð við Pedrini kvartettini**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Í 1999 tóku fýra ungir strúkarar millum 18 og 22 ár stig til hesa strúkikvartett, sum longu nú hevur víst seg at vera ein væl umtóktur bólkur. Tríggir av tónleikarunum eru slopnir inn á musikkonservatorium eftir summarfrítíðina, tann fjórða Iben Wiene hevur siglt við skúlaskipinum Georg Stage árið 2000 - hon drívur nú á kvartettspælið vetrarhálvuna og siglir við seglum um summarið.

Í vár hevði Pedrinikvartettin fyrstu ferð almenna konsert. Hetta var í Rundatorni, har tey m.a. frumframførdu ein kvartettsats eftir ein av luttakarunum, Runa Sørensen, ið er hálvur føroyingur.

Oftani spæla tey á sokallaðum “Basecamps” úti á bygd í Danmark, og í fríløtunum stuttleika tey sær við at jamma bæði klassiskt, fólkatónleik og jazz á matstovum og kaféum.

Tey skulu á føroyaferðini vitja musikkskúlan í Havn, har tey fara at spæla fyri næmingunum.

<u>Skáin á Matiné-ini í Havnar kirkju er:</u>
1. Felix Mendelsohn Bartholdy: Capriccio í e-moll
2. Antonin Dvorak: “Hin amerikanska strúkikvartettin”
3. Carl Nielsen: Strúkikvartett nr.1

Lutakararnir í Pedrinikkvartettini eru: Rune Sørensen,violin,Iben Wiene, violin, Rune Lundsgaard, bratsj, Ananna Lützhøft, sello.

# Ung fyri Miðflokkin stovnað

**Miðflokkurin fær nú, eins og teir stóru flokkarnir, stuðul frá einum ungmannafelag**

UNGDÓMS-POLITIKKUR
*John Johannessen*

Ung í Miðflokkinum hava seinasta árið arbeitt við at stovna eitt ungmannafelag at stuðla Miðflokkinum.

Hetta felag er nú stovnað, og hevur tað fingið heitið Ung fyri Miðflokkin.

Felagið sigur seg hava til endamáls at ávirka og stuðla politikk Miðfloksins, at boða politiska boðskap floksins fyri føroyska ungdóminum, at virka fyri at fáa ung tilvitað um føroyskan politikk og at vísa týdningin av, at trúgvandi velja trúgvandi at ráða í egnum landi.

Øll trúgvandi, ið hava Jesus sum Harra í sínum lívi, kunnu sambært Umg fyri Miðflokkin vera limir í felagnum.